# Fleiri túsund við í kalendarakappingini

**Jónmei Jacobsen í Leirvík var hepni vinnarin av høvuðsvinninginum, sum er eitt gávukort frá Miklagarði upp á 20.000 krónur. Fimm aðrir góðir vinningar vóru í jólakalendarakappingini hjá Sosialinum**

KAPPING

Tað var ein glaður Bassi, sum í gjár legði leiðini fram við Miðlahúsinum í Vágsbotni, har hann fekk heiðurin av at trekkja teir seks vinnararnar í kappingini hjá Sosialinum.

Høvuðsvinningurin var eitt gávukort frá Miklagarði við virði kr. 20.000. Hepni vinnarin var Jónmei Jacobsen í Leirvik.

Familjuferðina fyri tvey vaksin og tvey børn við Atlantic Airways við uppihaldi á Lalandia í Danmark vann Fríðhild Jacobsen í Hvalba.

Oljuna frá Shell virði kr. 10.000 vann Elsebeth Andreasen í Havn.

Familjuvikuskifti í Kongasvituni á Hotel Tórshavn fyri tvey vaksin og tvey børn umframt gávukort til Bowling Høllina, Pizzacafeina og Havnar Bio vann Leila Vang Haraldsen í Miðvági.

10 sodavatnskassar frá Faxe Kondi vann Eyð Jespersen í Hovi.

8 kilo av Merrild kaffi frá Poul Michelsen heilsølu vann Edith Lamhague í Havn.

Sosialurin ynskir øllum vinnarunum hjartaliga tillukku og takkar øllum fyri stóru luttøkuna í kappingini - og ynskir øllum eitt gott nýggjár!

Vinnararnir fáa gávukortini sendandi um nakrar dagar.





*Jóhanna Vang á skrivstovuni trekti vinnaran Kánus-kappingini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Agnas vann Kánus-ferðina

KAPPING

Umframt omanfyrinevndu kappingar hava vit eisini havt eina Kánus-kapping, har høvuðsvinningurin var ein uttanlandsferð fyri tvey við Atlantic Airways og fimm Kánus-spøl.

Kánus kom á marknaðin til jóla, og tað hevur gingið sum heitt breyð.

Hepni vinnarin av høvuðsvinninginum var Agnas Mortensen á Argjum.

Tey fimm, sum vunnu hvør sítt Kánus spæl, vóru:

Pauli í Jansagerði í Havn
Maiken Olsen í Havn
Hallur Biskopstø í Klaksvík
Anna Mørkøre á Velbastað
Helena Svabo Ziska í Havn